# Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag

# um skiparar og stýrimenn á vaktar- og bjargingarskipum landsins

Vísandi til § 31 í ll. nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins verður henda avtala gjørd.

## § 1. Øki

Henda avtala er galdandi fyri skiparar og stýrimenn á vaktar- og bjargingarskipum landsins.

## § 2. Flokking og starvsaldur

Skiparar og stýrimenn verða flokkaðir sambært lønartalvuni fyri tænastumenn soleiðis:

- Skipari – lønarflokkur 36
- Yvirstýrimaður – gongur lønarflokkarnar 32 og 33
- 1. stýrimaður – lønarflokkur 30

Teir skiparar og stýrimenn, sum gerast tænastumenn, fáa við tann starvsaldur, sum teir hava forvunnið sum sáttmálasettir og verða flokkaðir samsvarandi tí.

*Stk. 2.* Hava fólk vunnið sær lønar- og tænastualdur við skipum landsins, skulu tey verða innplaserað eftir tí. Avgerð um plasering verður at taka aftaná samráðingar millum avvarðandi stovn/Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

*Stk. 3.* Stovnarnir kunnu, har umstøður tala fyri tí, loyva at annar starvsaldur telur við, um talan er um tænastu í líkastillaðum ella hægri starvi sum skipari ella navigatørur. Stovnurin skal í tílíkum føri senda málið til Føroya Skipara- og Navigatørfelag til ummælis.

*Stk. 4.* Verður skipari ella stýrimaður í landsins tænastu fluttur í hægri starv hjá skipum landsins, kemur hann á tað stig í nýggja lønarflokkinum, sum liggur næst omanfyri ta løn, hann hevði frammanundan, og fær næstu aldursviðbót frá sama mundi sum frammanundan uttan so, at framflutningurin viðførdi, at lønarhækkanin svaraði til meira enn eitt lønarstig. Tá so er, fær hann nýggja aldursviðbót tvey ár aftaná framflutningin.

*Stk. 5.* Tá ið nýggj skip koma, skal samráðing verða millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag um bólking av teimum.

## § 3. Arbeiðstíð

Vanliga arbeiðstíðin er tvær vikur á 84 tímar og síðani frí í 2 vikur.

## § 4. Úrtíðarlønir

Manningarnar hava ikki rætt til úrtíðarløn, hvørki gerandis- ella sunnu- og halgidagar, tí henda er viðroknað í føstu lønina, sí tó stk. 5 í hesi grein.

Fyri arbeiði 15. tíma og meira um samdøgrið verður goldin úrtíðarløn 2.

Verður ein boðsendur til arbeiðis í tí í § 2 ásettu frítíð, til dømis tá ið skipini eru til umvælingar og eftirlit, eins og skeiðvirksemi kemur fyri, verður latin úrtíðarløn soleiðis:

Úrtíðarløn 1. 1/2080 av samlaðu árshýruni á viðkomandi lønarstigi í avvarandi lønarflokki + 30% um tíman verður latin yrkadagar.

Úrtíðarløn 2. 1/2080 av samlaðu árshýruni á viðkomandi lønarstigi í avvarandi lønarflokki + 40% um tíman verður latin sunnu- og halgidagar, flaggdagin, ½ grundlógardag, ólavsøkudag og ½ ólavsøkuaftan.

*Stk. 2.* Hevur skipari ella stýrimaður upparbeitt úrtíð samb. stk. 1, skal tað verða viðkomandi loyvt, har viðurskiftini loyva tí, at fáa hesa tíð útgoldnað ella lagda afturat árligu frítíðini. Tá skal henda avspasering verða roknað ígildis úrtíðarlønini.

*Stk. 3.* Tá ið skip hjá vaktar- og bjargingartænastuni eru seinkað av, at sleip/bjarging strekkir seg inn í avspaseringstíðina hjá manningunum, so at tær av hesi orsøk ikki sleppa til hús avloysingar-

dagin, fáa tær somu løn og avspasering sum fyri siglitíð eftir vanligari vaktarskipan + 30% yrkadagar og 40% sunnu- og halgidagar, tó ikki minni enn fyri 12 tímars arbeiði. Hetta er at skilja soleiðis, at um skipið t.d. kemur inn dagin eftir, meira enn 24 tímar aftaná, at manningarskiftið var ætlað, men tó so tíðliga á degi, at allir sleppa heim, verður bara goldið fyri 12 tímars arbeiði. Stk. 3 er bara galdandi, um skipið er seinkað meira enn 3 tímar roknað frá vanliga fyriskipaðari avloysing (manningarskifti).
*Stk. 4.* Verður í mistu avspaseringstíðini eftir stk. 3 arbeitt í meira enn 12 tímar um samdøgrið (vaktarbrot) verður latin úrtíðarløn 1 fyri 13. og 14. tíman og úrtíðarløn 2 fyri eftirfylgjandi tímar, so leingi arbeitt verður.
*Stk. 5.* Fastir frídagar eru jólaaftan og 1. og 2. jóladagur. Manningarnar kunnu ikki bera seg undan, um álagt verður teimum at sigla nevndu dagar. Um silgt verður, verður úrtíðarløn 2 latin jbr. stk.1.
*Stk. 6.* Omanfyri standandi stk. 1 til 4 eru ikki galdandi fyri teir, sum eru í 35. lønarflokki ella hægri. Verða teir boðsendir til arbeiðis í tí í § 3 ásettu frítíð, fáa teir samsvarandi frítíð í staðin (tvs. at tímarnir verða frígingnir 1:1). Ber ikki til at fríganga tímarnar, verður ein dagur umborð roknaður sum 12 tímar. Samsýningin er vanliga tímalønin í viðkomandi flokki og á viðkomandi stigi.Verður skeið hildið í frítíðini hjá skeiðluttakarunum, verður goldin vanlig tímaløn fyri teir tímar, skeiðið er, tó í mesta lagi 8,4 tímar hvønn dagin. Ferðing til skeið, sum liggur aðrastaðni enn vanligi arbeiðsstaðurin, verður roknað í skeiðstíðina.

## § 5. Bjarging

Skiparar og stýrimenn taka ikki lut í bjargingarløn, tó eiga teir samsýning, tá ið talan er um bjarging av útlendskum skipum.
*Stk. 2.* Fyri bjarging/sleip av útlendskum skipum verður latin manningunum 20% av endurgjaldinum í samsýning, sum verður býtt millum menninar í mun til føstu lønir teirra.
*Stk. 3.* Fyri arbeiði í samband við sleip/bjarging av "deyðum" skipum uttan fyri havn verður goldið skipara/stýrimonnum samsýning, sum er 1/4160 av samlaðu árslønini á viðkomandi lønarstigi í avvarðandi lønarflokki + 30% um tíman yrkadagar og 1/4160 + 40% sunnu- og halgidagar. Nevnda samsýning verður bæði goldin teimum, sum hava vakt og teimum, sum áttu at verið á frívakt. "Deyð skip" eru skip, haðani manningin er rýmd, ella sum av aðrari orsøk ikki hava manning umborð.
*Stk. 4.* Fyri kaving verður goldið kavarum og hjálparmonnum samsýning sambært teimum góðkendu gjøldum fyri kaving.

## § 6. Fyribils tænasta í hægri starvi

Skiparar og stýrimenn, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslag, røkja hægri størv í minst eina viku, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vóru settir í starvið, treytað av, at teir yvirtakað tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

## § 7. Fyribils hjálp o.a.

Frítíðar- og fyribilsavloysarar verða løntir í tí til starvið hoyrandi lønarflokki, sambært egnan lønar- og tænastualdur, vunnin við skipum landsins. Tá ið ein av manningini í avspaseringstíð síni avloysir annan, fær hann somu løn sum eftir vanligari vaktarskipan.

## § 8. Sjúka hjá børnum og barnsferð

Skipari/stýrimaður kann fáa frí við løn, tá barn/børn hansara eru sjúk, tó hægst 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi 10 dagar árliga. Hevur viðkomandi meira enn 2 børn undir 10 ár kann viðkomandi fáa frí upp til 20 dagar.
*Stk. 2.* Í samband við barnsferð hjá hjúnarfelaga ella adoptión kann skipari/stýrimaður fáa frí í 1 mánað uttan løn uttan miss í lønaraldri.

## § 9. Frítíð

Frítíðarreglurnar eru sum fyri tænastumenn landsins. Tænastumenn koma í høvuðsheitum undir frítíðarlógina. Fer tænastumaður úr starvi, tí hann verður eftirløntur, skal hann halda vunna frítíð, áðrenn hann fer úr starvi. Í slíkum føri verður frítíðin roknað sum 2,5 frídagar fyri hvønn mánað, hevur tænastumaðurin 5 daga arbeiðsviku. Tænastumaður, sum verður sagdur úr starvi fyri sjúku, vinnur ikki rætt til frítíð við løn í sjúkratíðini, sum er beint uppundir uppsøgnina.

*Stk. 2.* Sjúkradagar í frítíð verða vanliga roknaðir sum frídagar. Tó kunnu eftir umsókn í serligum føri, har sjúkan forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og verða nýggir frídagar tá givnir. Um arbeiðsfólkið er árbeiðsført, tá ið frítíðin byrjar, verða latnir eyka frídagar. Somu reglur eru galdandi í sambandi við sjúku undir avspáking.

*Stk. 3.* Skiparar og stýrimenn fáa av útgoldnari yvirtíð 12% í frítíðarløn í grunn.

## § 10. Kostpeningur

Manningarnar eiga rætt til frían kost í arbeiðstíðini. Eru ikki umstøður at matskaffa á skipi, verður veittur dag- og tímapeningur 4 tímar um dagin. Fyri sigling 75 tímar ella meira um vikuna verða veittir 5 tímar um dagin.

*Stk. 2.* Skiparar/stýrimenn eiga frítt uppihald, um teir ikki kunnu búgva umborð, tá ið skipið er heimanífrá, og tá ið tað ikki ber til hjá manningini at búgva heima, meðan arbeitt verður umborð. Kann ikki matskaffast umborð, verður veittur dag- og tímapeningur. Ber ikki til at sova umborð, verður veitt náttitarviðbót. Dag- og tímapeningur og náttarviðbót verða sum fyri tænastuferðir hjá tænastumonnum landsins.

## § 11. Fakfelagsarbeiði

Um skipari/stýrimaður er valdur í nevnd felagsins, skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum føri, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum Fíggjarmálaráðið og felagið, um tørvin á slíkum arbeiði. Formaðurin í felagnum ella Fíggjarmálaráðið ger stovnin varan við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

## § 12. Skeiðvirksemi

Tá ið skeiðvirksemi fer fram eftir ynski stovnsins, skal avvarðandi stovnur útvega luttakaranum prógv fyri tað, skeiðið hevur umfatað. Fyri luttakarar, sum búgva í øðrum kommunum enn henni, skeiðvirksemi er lagt og í minsta lagi 4 km. frá skeiðstaðnum, eru reglunar í § 13 galdandi.

*Stk. 2.* Skiparar og stýrimenn, ið starvast hjá Vaktar- og Bjargingartænstuni, hava skyldu at luttaka á teimum skeiðum, ið Vaktar- og Bjargingartænastan fyriskrivar.

*Stk. 3.* Á slíkum skeiðum rindar Vaktar- og Bjargingartænastan luttakarunum løn eftir tí tímatali, ið svarar til ein normaldag í tí siglingarskipan, ið viðkomandi siglir eftir.

*Stk. 4.* Verður skeiðið hildið í frítíðini hjá skeiðluttakarunum, eigur viðkomandi yvirtíð sambært § 4, stk. 1 ella 2, við tí tímatalið, ið svarar til ein normaldag í tí skipan, ið viðkomandi siglir eftir.

*Stk. 5.* Stk. 3 og stk. 4 eru tó ikki galdandi fyri teir, sum eru flokkaðir í lønarflokki 35 ella hægri. Víst verður til § 4, stk. 6.

*Stk. 6.* Um skipari/stýrimaður sjálvur í frítíðini ynskir at luttaka á skeiði, sum ikki er kravt til starvið, verður hetta ikki roknað sum arbeiðstíð. Tó kann í hvørjum einstøkum føri gerast avtala við Vaktar- og Bjargingartænastuna, at skipari/stýrimaður fer á skeið, har stovnurin rindar skeiðkostnaðin, kost og innivist sambært § 13 í sáttmálanum.

## § 13. Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verða sum fyri tænastumenn landsins.

## § 14. Eyðkennisbúnar

Viðvíkjandi eyðkennisbúnum verður víst til reglugerð frá 8. okt. 1985 um eyðkennisbúnar hjá manningum á vaktar- og bjargingarskipum landsins.

## § 15. Samstarvsráð

Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita. Samstarvsráði skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða av-gerðir ikki tiknar, fyrr enn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli. Settur verður 4 manna bólkur við 2 umboðum valdum av yrkisfeløgunum og 2 valdum av Landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum. Til endaliga reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum er samtykt, verður henda regla galdandi í sambandi við uppsøgn:

Yrkisfelagið skal hava boð um uppsøgnina við nágreiniligari grundgeving, og verður uppsøgnin ikki givin, fyrr enn yrikisfelagið innan 1 viku hevur ummælt uppsøgnina.

Landsstýrið ásannar, at yrkisfelagið hevur samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum.

## § 16. Tilkallivaktarskipan

Um skipari ella stýrimaður tekur við tilkallivakt, so skal hann fáa hetta samsýnt eftir somu reglum, sum eru galdandi fyri tilkallivakt á strandfaraskipum.

## § 17. Samsýning fyri næmingar

Tá ið sjómansskúlanæmingar eru um borð, fáa skipari og stýrimenn samsýning fyri undirvísing, sum tilsamans er:

Mánaðarløn hjá lærara x dagatalið umborð / 30. Haraftrat verða goldnar 2% av mánaðarlønini hjá lærara hvønn dagin, lærarin er um borð. Leygardagar, sunnudagar og fastar frídagar er gjaldið 4%.

## § 18. Gildiskoma og uppsøgn

Henda avtala kemur í gildi tann 1. apríl 2012 og kann sigast upp av báðum pørtum við 3 mánaða skrivligari uppsøgn at fara úr gildi í fyrsta lagi tann 1. apríl 2014. Avtalan er tó í gildi til nýggj avtala er gjørd.

*Á Argjum tann 22. juni í 2012*

Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Fíggjarmálaráðið